# ítróttur

Nr. 21 • mánadagur • 30. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Jón vann silvur í DM

**Jón Rosenblad úr Lamba var við í kappingini um gullið, tá ið Danmarksheitið í innandurarógving stóð upp á spæl um vikuskiftið. Jón tók seg munandi fram samanborið við í fjør og endaði sum nummar 2**

RÓGVING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

27 ára gamli Jón Rosenblad gjørdi aftur um seg í eini danskari kapping í innandurarógving um vikuskiftið.

Jón, sum er fremsti føroyski rógvarin í hesum ítrótti, tók lut í DM, og hann stóð seg heilt væl. Jón var við í kappingini á 2000 metrum.

Í fjør endaði hann sum nummar 5 í DM, men hetta skuldi betrast í kappingini í ár.

Leygardagin vóru innleiðandi kappingar, og tá stevndi Jón beint í finaluna við eini góðari tíð - munandi betri tíð, enn hann nýttist at hava í innleiðandi kappingini.



*Jón Rosenblad er næstbesti danski rógvarin, tá ið tað kemur til innandurarógving. Hann var við í DM um viksukiftið, og stóð seg heilt væl*

**Tann sterkasti var ov sterkur**

Sunnudagin vóru finalurnar á skránni, og her var Jón við heilt frammi. Hann var um at taka sítt persónliga met á teininum, men endaði ein tíggjundapart aftanfyri. Tíðin 6,00,6 var tó nóg mikið til eitt silvurmerki í kappingini.

Peter Sylvest royndi at sláa danska metið, sum er 5,55,5, men tað eydnaðist ikki, hóast sterki rógvarin vann kappingina við tíðini 5,56,0.

Jón fær møguleikan at kappast í Føroyum um stutta tíð, tí 11. februar verður kapping í innandurarógving í Havn.

# Tær sterkastu máttu skiljast sundur

**Sterkastu kvinnuliðini í kappingini í fjør eru seedað í steypakappingini, og tey kunnu tí ikki møtast fyrr enn í finaluni. Lutakast var leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin hevði Fótbóltssambandið fund við feløgini um kvinnufótbólt. Millum tað, sum var á skránni, var lutakast til steypakappingina hjá kvinnum.

FSF hevur gjørt av, at tey tey sterkastu liðini í kappingini í fjør, B36 og KÍ, sum eisini spældu finalu seinast, ikki kunnu spæla ímóti hvørjum øðrum fyrr enn í finaluni. Hetta skal sambært FSF tryggja, at finalan verður jøvn og áhugaverd.



*B36 og KÍ spældu steypafinalu í fjør, og vinna tey sínar dystir í steypakappingini, so verður hetta endurtikið í ár, tí feløgini kunnu ikki møtast fyrr enn í finaluni.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Lutkastið lagaði tað soleiðis, at B36, sum er steypavinnari, skal spæla ímóti ÍF á heimavølli í fjórðingfinaluni. KÍ skal spæla á útivølli ímóti EB/Streymi.

Hesir dystir verða tann 13. mars

30. spríl og 5. juni spæla feløgini tær tvær hálvfinalurnar, og 1. juli verður finalan spæld í Havn.

**10 kvinnulið**

Landskappingin í kvinnufótbólti hevur havt skiftandi eydnu seinnu árini, men í ár verður luttøkan í kvinnukappingini á góðari leið, tí 10 feløg hava teknað kvinnulið til.

Tá ið talið á kvinnuliðum broytist frá ári til ár, má FSF taka støðu til kappingarháttin mest sum á hvørjum ári.

Leygardagin varð eitt uppskot lagt fyri feløgini um, at tey 10 liðini verða býtt í 1. deild og 2. deild. Í 1. deild skulu verða feløgini KÍ,B36, GÍ, EB/Streymur, AB og SÍ, meðan Sumba, HB, NSÍ og ÍF skulu spæla í 2. deild.

Uppskotið fekk misjavna undirtøku, og FSF hevur nú fingið viðmerkingar frá feløgunum til uppskotið, sum skal viðgerast endaliga í næstum.

**Steypakappingin hjá kvinnum**

**Innleiðandi dystir**
1. GÍ-Sumba
2. EB/Streymur-SÍ

**Fjórðingsfinalur, 13. mars**
3. V2-KÍ
4. NSÍ-V1
5. AB-HB
6. B36-ÍF

**Hálvfinalur (2 dystir), 30. apríl og 5. juni**
7. V3-V4
8. V5-V6

**Finala, 1. juli**
9. V7-V8

# Suni og Jón Rói missa generalin á liðnum

**Aab Hevur gjørt av at selja stýrmanin á miðvøllinum. Sviin Martin Ericsson fer nú at spæla við Brøndby. Hinvegin hevur felagið fingið ein brasiliumann í hópin**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Miðvallarspælarin Martin Ericsson er seldur til Brøndby, og harvið missir AaB sín kanska besta spælara seinnu árini. Sviin hevur verið miðvallarovasti, og fleiri stór norðurlendsk feløg hava ligið fram við eftir spælaranum, sum ikki vil leingja sín sáttmála við AaB.

Tí hevur felagið gjørt av at selja hann nú, meðan teir framvegis kunnu fáa nakrar krónur fyri hann. Og í Brøndby er ovmikið av pengum í kassanum eftir søluna av Dennis Agger til Liverpool, og samstundis hevur Ericsson staðið ovarliga á ynskilistanum hjá venjaranum Michael Laudrup.

**Nýggjan álopsspælara**

Ein annar AaB-spælari skal eisini í annað felag. Tað er ungi Jacob Sørensen, sum verður leigaður út í eitt hálvt ár, so hann kann fáa neyðugu spælitíðina til at gera seg galdandi á U21 landsliðnum, ið skal við í EM-endaspælið í summar.

Hinvegin hevur AaB fingið ein brasilskan spælara við í hópin afturat. Tað er 23 ára gamli álopssinnaði spælarin Caca, sum kemur frá Atletico Mineiro, men hevur spælt fyi MSV Duisburg seinastu tíðina.

AaB er júst farið á venjingarlegu í Turkalandi, og Caca er farin við liðnum. Ætlanin er, at AaB ger ein eitt ára sáttmála við spælaran í hesari vikuni.